## Aalborg ger íløgu í Nuuk

Í fjør vann havnin í Aalborg eina útbjóðing um farmaflutning millum Danmark og Grønland, og nú hevur havnarleiðslan gjørt av at gera íløgur í eina havnarútbygging í Nuuk. Tað skrivar Nordjyske Stiftstidende. Claus Holstein, havnarstjóri, sigur við blaðið, at ætlanin er at víðka havnina í Nuuk munandi og at bøta um tær verandi umstøðurnar. Harumframt skal raksturin rationaliserast, uttan at tað skal kosta arbeiðspláss.



*Havnin í Nuuk skal byggjast út og nútímansgerast (Mynd: KNR)*

## Stavanger er kosin ársins mentanarhøvuðsstaður

Alt 2008 verður skipað fyri mentanarvirksemi av øllum slag í Stavanger og har um vegir. Seinast ein norðurlendskur býur var mentanarhøvuðsstaður var í 1998, tá ið Stokkhólmur fekk hetta heiðurliga ES-heitið. Keypmannahavn var evropeiskur mentanarhøvuðsstaður í 1994, og næsti norðurlendski býurin verður Turku í 2011. ES hevur tilnevnt mentanarhøvuðstaðir síðani 1984. Hugsanin aftan fyri skipanina er, at mentan kann vera ein motorur fyri siðmentaða býarmenning. 3-6 februar verður barna- og ungdómsbókmentaráðstevna í Stavanger, har føroyingar eisini fara at luttaka. M.a. skal Solveig Debess leggja fram um lesikanningina, hon hevur gjørt av føroyskum børnum. Kelda www.bfl.

# nn bjarga degnum




*- Hetta hevur tikið sína tíð, men nú sleppa vit umsíðir at kasta eftir sild, sigur Tummas Petur*

> *Tað er líkasum at brislingurin og sildin ikki dáma hvørt annað. Í øllum førum eru tey ikki á Skálafjørðinum samstundis*

> *Eg veit ikki, hvussu tað ber til, men vit hava faktiskt ikki hug til nakað annað enn hetta*

> *Ja, taðvejden. Skuldu vit roknað arbeiðstíðina út í krónum og oyrum, so hevði tað verið ein sera stór upphædd*

fyri tann saks skuld. Men tað hevur lítið at týða fyri teir.

- Eg veit ikki, hvussu tað ber til, men vit hava faktiskt ikki hug til nakað annað enn hetta, sigur Tummas Petur brosandi.

Besta tíðin at royna eftir sild á fjørðinum er frá desember mánaði og út í februar. Er talan um eitt gott ár, er sild at fáa heilt út í mars mánað.

Hinvegin so vísir tað seg eisini, at árini eru ójøvn til fiskaslag. Summi ár fæst bara tað eina slagið og onnur ár hitt.

- Tað er líkasum at brislingurin og sildin ikki dáma hvørt annað. Í øllum førum eru tey ikki á Skálafjørðinum samstundis, sigur hann.

Í 2005 fingu teir nærum bert sild, men bæði í 2006 og í fjør var brislingur at fáa.

Hinvegin eru eisini onnur støð, har sild og brislingur eru at fáa, millum annað á Tangafirði, Funningsfirði og av og á eisini út fyri Eiði.

### Klárt at leggja frá landi

Fyri teir umborð á Bakkabergi hevur tað skund at sleppa til fiskiskap, um nakað skal fáast burtur úr hesi vertíðini.

Umframt Bakkaberg royna tveir aðrir bátar eftir sild og brislingi hesa vertíðina – Veðranes úr Hósvík og Katrin úr Søldarfirði.

Hesir báðir hava roynt síðani í desember mánaði í fjør og sum skilst hevur veiðan verið heilt hampilig higartil.

Hósdagin í farnu viku vóru teir tríggir aftur umborð á Bakkabergi og arbeiddu. Teir kundu tá staðfesta, at nú vantaði lítið í, til teir kundu leggja frá landi fyrsta túrin.

- Vit vænta at brúka eina góða viku aftrat. Tá skuldu vit kunna lagt frá landi á fyrsta sinni, sigur Tummas Petur spentur á málinum.




*Hava teir einki fingið allan seinnapartin, kann eitt skýmingarkast bjarga degnum. Bakkaberg kann lasta 25 tonsum av sild*